LØGTINGIÐ

Mentanarnevndin

Løgtingsforkvinnan

12. desember 2025
hm/ód

Leingjan av freist til framløgu av áliti í:

- **løgtingsmáli nr. 50/2025: Uppskot til løgtingslóg um miðlastuðul (Miðlastuðulslógin)**
- **løgtingsmáli nr. 65/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Tjóðpall Føroya og stuðul til leiklist v.m.** (Flyta stuðulin til yrkisleiklist til Mentanargrunn Landsins, áseting um varalimir og aðrar smærri broytingar)

Uppskotini vóru til 1. viðgerð 11. desember 2025 og eftir hetta beind Mentanarnevndini. Útlit eru ikki fyri at viðgera málini, fyrrenn komið er inn í januarmánað. Tí fer nevndarformaðurin at heita á løgtingsforkvinnuna um at leingja freistina sbrt. § 32, stk. 2 í Tingskipanini viðvíkjandi teimum báðum omanfyrinevndu málum til mikudagin 18. februar 2026.

Vegna nevndarformannin

Hallur Markná
nevndarskrivari

TINGHÚSVEGUR 1-3
POSTBOKS 208
100 TÓRSHAVN
TLF. 363900
FAX. 363901

LOGTING.FO